

KRONIKK

# Broytt og varðveitt

**Ólavsøkan er so nógv. Hóast hvør ólavsøka líkist, er hon altíð nýggj**

**Theodor E. D. Olsen**

*Bert tann, ið broytist, er trúgvur ímóti sær sjálvum!*

Orðini eigur týska skaldið sangarin, Wolf Biermann.

Hetta er helst eisini galdandi fyri ólavsøkuna, sum neyvan hevði verið tann aldargamla hátíðin, um ikki onkrar broytingar og ískoyti vórðu gjørd viðhvørt.

Tí hátíðir ella høgtíðir halda vit, tí tær á einhvønn hátt eru omanfyri tíðina annars.

Vit kunnu spyrja, um fólk enn høvdu tust til høvuðsstaðin, um t.d. felagssangurin, livandi tónleikur ella candy floss so við og við ikki høvdu funnið sær eina rók at sita á í ólavsøkuskránni.

Men ólavsøkan er sum sagt gomul, og onkutíð hevur verið spurt, hvør eigur ólavsøkuna?

Hesin spurningur er næstan líka gamal sum spurningurin um, hvør kom fyrst: eggið ella hønan?

Sjálvandi eigur Føroya fólk ólavsøkuna, hóast hon upprunaliga stavar úr Noregi. Hyggja vit eftir ólavsøkuskrúðgonguni, ið helst hoyrir til tann meira formella partin, so er tað løgtingsformaðurin ið skipar skrúðgonguna, hóast farið verður oman í sjálva Dómkirkjuna, Havnar kirkju.

Ólavsøkumorgun ganga prestar, politikarar og embætisfólk í skrúðgongu oman í Dómkirkjuna, áðrenn Løgtingið verður sett.

Tingseta og guðstænasta eru aldagomul fyribrigdi í Føroyum, men frá gamlari tíð hava tey tó verið hildin hvør sær. Frá 1816 til 1852 var einki løgting, tí tað var avtikið, men kortini varð guðstænasta hildin allar hesar ólavsøkurnar. Ikki fyrr enn í 1869 tykist tað, sum at tað beinleiðis verður mint á, at guðstænastan verður hildin í »*Anledning af Lagtingets Aabning*«.

Ólavsøkuguðstænastan hevur sín uppruna í tí tíðini, tá Føroyar vóru katólskt biskupsdømi, og Ólavur kongur hin heilagi varð mettur at vera størsta halgimenni í Norðurlondum.

Av tí sama varð komið saman til árligar kirkjufundir á deyðadegi hansara. Eftir at Føroyar ikki longur vóru biskupsdømi, helt próstúrin – eisini eftir siðaskiftið – fram við at halda árligan fund, og fundarbøkur eru til enn frá hesi tíðini. Frá uml. 1700 verður fundarbókin førd regluliga. Árini eftir hetta verður vanliga hvørt ár nevnt, at fundur og guðstænasta hava verið hildin ólavsøkudag, hvør hevur prædikað, og hvat hevur verið viðgjørt. At siðurin tó helst er eldri, sæst m.a. av, at ofta verður skrivað, at hetta er tann »vanligi fundurin«, sum verður hildin ólavsøkudag.

Nøkur ár detta tó burtur ímillum, tá eingin fundur ella guðstænasta er. Eitt nú í 1781 var eingin fundur, tí bæði Havnin og fleiri bygdir vórðu raktar av meslingum.

Síðani Løgtingið varð endurreist, hevur skrúðgongan verið fastur táttur og fatað sum ein ímynd av læruni hjá Luther um tey bæði vøldini – tað andaliga og tað verðsliga – men ongar formligar ásetingar vóru um gonguna. Heldur ikki, tá heimastýrislógin kom í gildi í 1948.

Í 1995 fingu Føroyar nýggja stýrisskipanarlóg, og hetta merkti ikki sørt skrúðgonguna. Nú skuldi tingformaðurin gera av, hvussu skrúðgongan skuldi mannast.

Í 1998 varð avgjørt, at ístaðin fyri tvær røðir, skuldi skrúðgongan nú verða í trimum røðum. Kirkjan fekk tá eina røð fyri seg.

Men hóast ólavsøkuguðstænastan og tað, at Løgtingið verður sett, sum so einki hava við hvørt annað at gera, so skerst ikki burtur, at prestar eru í Havn á ólavsøku, av tí at teir í meir enn 300 ár hava hildið fund ólavsøku. Eisini um einki løgting hevur verið.

Hevur tingið verið saman í Havn um sama mundið, hava tingmenn og prestar verið í kirku saman. Í 1673 greiðir Lucas Debes frá, at prestarnir eru í Havn, so leingi sum tingið situr, at guðstænasta verður hildin hvønn morgun, og at »Geistlige og Verdslige« halda veitslu saman í tinghúsinum, tá ið setan er av. Men eisini tey tíðarskeiðini, tá ið einki løgting hevur verið, ella Løgtingið hevur verið sett um heystið, hevur kirkjan hildið sína ólavsøkugudstænastu.

Í skaldsøguni Barbara lesa vit m.a., at tað er presturin, »*der sidst var kommet til Landet*«, sum prædikaði á ólavsøku, og høvundurin Jørgen-Frantz Jacobsen tekur heldur speiskliga til, at »*alle var mødt frem for at høre, hvilke formanende Ord han havde at sige til Tingmændene*«.

Ofta hava prestar tó verið varnir við at umrøtt politikk í sínum ólavsøkuprædikum, hóast samfelagslig viðurskifti sjálvandi verða umrødd.

Prædikan, sum K.O. Viderø helt í 1950, man tó vera eitt slag av klassikara í síni umrøðu av samfelagnum, og er hon prentað í bókini »Lívið spratt av kærleiks rót«.

Í dag er tað tó ikki tann nýggjasti presturin, sum heldur ólavsøkuprædikuna, tí eftir at kirkjan varð yvirtikin, varð gjørt av, at tað er tann elsti í embæti ella hægsti í tign, sum prædikar.